

*Stórar broytingar verða gjørdar í svimjihøllini í Klaksvík, tá hon verður umvæld fyri einar 25 milliónir krónur*

# Liðugt við at kava

**Svimjihøllin í Klaksvík fær nýggjan skreiðibreyt ístaðin fyri kavihyl og vippur**

SVIMJING
*Eyðun Klakstein*

Tá umfatandi umbyggingarnar og umvælingarnar av svimjihøllini í Klaksvík fara rættiliga í gongd, verður tað samstundis liðugt við at kava av vippunum í høllini.

Ein av broytingunum í høllini er, at kavihylurin í høllini og vippurnar skulu burturbeinast, og ístaðin verður ein hylur við langari skreiðibreyt gjørdur í sunnara enda.

– Tað er ein so lítil partur av teimum, sum svimja, sum brúka kavihylin, at gestirnir fara uttan iva at fáa størri gleði av nýggja hylinum, sigur Kári Kjælnes, leiðari í svimjihøllini.

Umvælingarnar í svimjihøllini fara at kosta Klaksvíkar kommunu, sum eigur høllina, einar 25 milliónir krónur, og hetta er ein sera stór íløga fyri kommununa, sum verður gjørd yvir nøkur ár.

Men svimjihøllin er so slitin, at neyðugt er við hesum ábøtum, um hon ikki skal lata hana aftur.

# Rás 2 nærkast Suðuroynni

**Um nakrar vikur fer Rás 2 at røkka eini 90% av føroysku útvarpslurtarunum**

RÁS 2
*Eyðun Klakstein*

Rás 2 er um at verða klárt at seta nýggjan sendara upp, sum skal gera, at rásin fer at hoyrast av eini 90% av fólkinum.

Nýggi sendarin skal standa í Hesti, og hann fer at gera, at suðuroyingar fara rættiliga at hoyra rásina.

Sum nú er hoyra summir suðuroyingar Rás 2 umvegis sendaran á Sornfelli, men tá nýggi sendarin verður settur upp, er ætlanin, at so at siga allir suðuroyingar skulu hoyra Rás 2.

Onkur smærri støð í Suðuroynni eru trupul at røkka, men meginparturin av oynni fer at hoyra Rás 2

## Alt um at verða klárt

Sendarin, sum Rás 2 fer at seta í Hesti, er klárur. Suðuroyar Sparikassi hevur goldið fyri hendan sendaran.

Tað einasta sum nú manglar, er eitt av teimum mongu loyvunum, sum skulu til, áðrenn ein rás kann senda. Men hetta loyvi er av formligum slag og verður klárt fyrsta dagin.

Tá ætlar Rás 2 sær undir at seta sendaran upp, og tað tekur nakrar vikur, áðrenn sendarin kann senda.

Fyrsta stigið í ætlanini hjá Rás 2 er at røkka Suðuroynni, men seinni verða helst onkrar sendingar eisini gjørdar úr Suðuroynni.



*Rás 2 fær alsamt størri lurtaraskaða, og tá sendarin í Hesti fer at senda um nakrar vikur, hoyra eini 90% av føroyingum Rás 2*




Føroya bíligastu flogferðir:
Føroyar - Danmark og aftur

~~2600,-~~

1500,-

Vanligur APEX ferðaseðil til Danmarkar kostar kr. 2.600,-
Tilboðið er galdandi frá 1. februar til 1. apríl. Ferðirnar kunnu í mesta lagi vara ein mánað og í minsta lagi yvir leygardag og sunnudag, og skulu tvey ferðast saman.
Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast.
Ferðaavgjaldið sum er kr. 365,- kemur afturat prísinum.

SANSIR TEL 355 355

Atlantic Airways
Tel 333 900 · www.atlantic.fo

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið




# Riggar av heimastýrið við danskari hjálp

**Tó, einki fullveldi uttan danska hjálp. Heildarveitanin úr Danmark skal minkast eftir eini skipaðari ætlan, til hon er burtur í ár 2012**

FÓLKAATKVØÐAN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



Spenningur var í luftini hóskvøldið, tá landsstýrið hevði boðið til tíðindafund í Tinganesi um uppskot til løgtingslóg, har Føroya fólk, á eini fólkaatkvøðu, verður spurt um framtíðarstøðu Føroya fram móti fullveldi eftir einum leisti, sum landsstýrið hevur sett út í kortið. Dramatikkurin var til steðar longu uttanfyri. Landsynningurin lá vátur, regnmikil og myrkur yvir Tinganesi, sum kliptur úr eini skaldsøgu hjá William Heinesen. Tað var vantaði bert okkurt snarljósið og buldrið frá Tórði úr erva, so var pallmyndin fullkomin á hesum søguliga stað, har stórar avgerðir eru tiknar seinastu 1200 árini.

Tíðindafundurin vísti sjónliga fyri hvønn partin á politiska víðvøllinum í Føroyum fullveldi hevur størsta týdning. Meðan løgmaður, Anfinnur Kallsberg og landsstýriskvinnan Helena Dam á Neystabø vóru einsamøll til tíðindafundin uttan nakran flokksstuðul, so so var øll tingmanning Tjóðveldisflokksins og flokksskrivari við møtt upp í gomlu hølunum hjá danska kongaliga einahandlinum, fyri at fylgja við um landsstýrið og landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal bóru seg rætt at. Tey skipaðu eisini fyri undirhaldi, við millum annað at klappa, tá framløgurnar vóru lidnar.

## Greið ætlan

Anfinnur Kallsberg, løgmaður legði eina fullkomiliga greiða ætlan fram á tíðindafundinum.

-Vit staðfestu á seinasta samráðingarfundi við donsku stjórnina, at vit koma ikki víðari eftir tí leisti, sum landstýrið legði út við, tá vit løgdu ætlanina um framtíðarstøðu Føroya, also suverenitet fyrst og síðan eina skiftistíð. Tí leggja vit nú eina ætlan fram, har Føroya fólk skal taka støðu til, um vit fyrst tøma heimastýrislógina, tað vil siga yvirtaka tað sum er eftir, og síðan við einari nýggjari fólkaatkvøðu í 2012 taka støðu til um at skipa Føroyar sum eitt fullveldisríki, segði Anfinnur Kallsberg, løgmaður.

– Vit halda við hesum uppskotinum at vit í hvussu er kunnu fáa javnaðarflokkin við, tí uppskotið inniheldur júst tað sum javnaðarflokkurin hevur skotið upp í sjálvstýrisuppskoti sínum. Vit halda, at okkara uppskot er ein tryggur yvirgangur fram móti fullveldi, segði Anfinnur Kallsberg, løgmaður.

Uppskot landsstýrisins sær soleiðis út:

Tann 26. mai 2001 verður Føroya fólk á eini fólkaatkvøðu spurt, um tað tekur undir við eini løgtingslóg við hesum ásetingum.:

1. Øll málsøki verða eftir eini skipaðari ætlan løgd undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 2012.
2. Ein búskapargrunnug verður settur á stovn, ið skal tryggja Føroyum eina trygga skiftisskipan frá studningsbúskapi til sjálvberandi búskap.
3. Heildarveitingin úr Danmark verður minkað eftir eini skipaðari ætlan til hon er burtur.
4. Fólkaatkvøða verður um at skipa Føroyar sum eitt fullveldisríki í seinasta lagi í 2012.

## Vónbrotnir veljarar

Sosialurin: Landsstýrið legði hart út við at leggja ein leist, sum skuldi enda við fullveldi í hesum valskeiði. Nú er fullveldið skotið ein hálvan mannsaldur fram í tíðina. Hava teir veljarar, sum hava stuðlað tykkum í fullveldisætlanini, serliga tjóðveldisveljararnir, nakra orsøk til at vera nøgdir í dag?

– Vit hava staðfest, at vit koma ikki longur við dønum, taka vit fullveldi fyrst og síðan rigga av. Nú gera vit tað øvugt. Vit rigga fyrst heimastýrislógina av og síðan verður Føroya fólk enn einaferð spurt, um tað er sinnað at taka fult ræði í egnum landi, sigur Høgni Hoydal.

Og Helena Dam á Neystabø heldur ikki, at veljarin hevur nakra orsøk til at vera vónbrotin.

– Okkara uppskot er ein sera trygg yvirgangsskipan, sum ikki kemur at ganga út yvir vælferðina í Føroyum. Við hesi skipan loypa vit ikki út í nakað, sum vit ikki kunnu stýra, sigur Helena Dam á Neystabø.

## Ótryggur búskapargrunnur

Løgmaður greiddi frá, at inntøkurnar eru ótryggar til Búskapargrunnin, sum skal trygga neyva búskaparliga stýring, meðan Føroyar fara frá studningsbúskapi til sjálvberandi búskap.

– Búskapargrunnurin skal fíggjast við inntøkum frá oljuvinnu, inntøkum frá sølu av fyritøkum hjá landinum, yvirskotsgjaldføri landsbankans, heildarveitingini úr Danmark og øðrum inntøkum., segði Anfinnur Kallsberg løgmaður.

Men landsstýrið er ikki sinnað, at siga blokkin upp beinanvegin, hóast at hesin ikki beinleiðis er neyðugur fyri at føroyingar sjálvir skulu klára sínar skyldur.

– Heildarveitingin næsta ár verður eftir uppskotinum 700 milliónir krónur og hon minkar við 50 milliónum næstu árini fram til 2012, tá veitingin er burtur.

## Klára okkum sjálvi

Føroyingar nýtast ikki pengar úr Danmark fyri at klára seg sjálvar. Høgni Hoydal, landsstýrismaður segði, at tey málsøki, sum enn ikki eru yvirtikin, kosta umleið 200 milliónir árliga. Løgmaður boðaði frá, at heildarveitingin úr Danmark í verandi fíggjarlóg er beint undir eina milliárd. Tað vil siga, at 800 milliónir er ein beinleiðis gáva úr Danmark, sum fer inn á bók hjá føroyingur, til at tryggja framtíðina í einum komandi fullveldi. Tað er júst hendan upphædd danskir politikkarar eru í øðini um.

# Støðan er álvarslig

**Poul Nyrup Rasmussen heldur, at støðan er álvarslig, nú landsstýrið hevur lagt fram eina ætlan, sum førir Føroyar út úr ríkisfelagsskapinum, verður hon framd í verki. Men stjórnin fer at virða avgerðina hjá føroyingum.**

FULLVELDISÆTLANIN
*Magnus Dam, Keypmannahavn*

Politikkarar á Christiansborg halda, at landsstýrið hevur tikið eitt rættiliga víðgongt stig, nú tað hevur tikið avgerð um at leggja nýggju fólkaatkvøðuna út til fólkaatkvøðu.

Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri, heldur, at landsstýrið hevur lagt fram eina prinsipiella og víðgongda ætlan, sum elvir til, at Føroyar fara út úr Ríkisfelagsskapinum.

– Danska stjórnin stendur við hesum fyri einari rættiligari álvarsligari støðu, sum setur eina røð av grundleggjandi stýrisskipanarligum og búskaparligum spurningum, sigur danski forsætisráðharrin.

Men samstundis sigur forsætisráðharrin, at hann fer at virða avgerðina, sum fólkið tekur á fólkaatkvøðuni í mai.

– Støðan hjá dønum er framvegis hon, at tað er Føroya fólk, sum avgerð framtíðar viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, sigur hann.

## Nærlesa uppskotið

Í Forsætisráðnum fara løgfrøðingar nú í vikuskiftinum at nærlesa føroyska uppskotið, og týsdagin fer Poul Nyrup Rasmussen at leggja fram eina greinan av føroysku ætlanini saman við sínum sjónarmiðum um ætlanina.

Poul Nyrup Rasmussen kennir ikki uppskotið í øllum sínum smálutum enn, og tí vil hann ikki gera beinleiðis viðmerkingar til sjálvt innihaldið í tí enn.

Týsdagin skal forsætisráðharrin á fund við Føroya-nevndina hjá Fólkatinginum, og har fer hann at leggja síni sjónarmið fram um ætlanina hjá landsstýrinum.

# Edmund sigur kortanei

FÓLKAATKVØÐAN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Vit fara at gera alt fyri at mæla okkara veljarum frá at atkvøða fyri uppskoti landsstyrisins, sigur formaður Sambandsflokksins, Edmund Joensen.

– Uppskotið hjá samgonguni er ósømiligt. Tað er einki annað uttan loysing við øvugtum fortekni. Hetta er ein einsíðug erklering frá landsstýrinum. Útspælið er ósømiligt á tann hátt, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark snýr sum um viðurskiftir millum tveir partar við felags grundlóg. Og tá landsstýrið á hendan hátt meldar út við einum uppskoti, sum miðjar móti fullveldi, uttan at taka danir við, so havi eg ilt við at taka uppskotið fyri fult, sigur Edmund Joensen.

– Sambandsflokkurin fer ongantíð at taka undir við einum uppskoti, sum byggir á eina loysn uttanfyri ríkisfelagsskapin, segði Edmund Joensen í stuttari viðmerking úr tinghúsinum í gjár.


ÚTSØLU-
ENDASPURTUR
ØLL VØRA ENN MEIRA NIÐURSETT

NOA NOA
TRANSIT
PAR-SUCH
TONE BARKER
BROR & SØSTER

29
Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99